# Føroyingar í altjóða oljuvinnu



Ben Arabo her í arbeiðsørindum í Kualalumpur í Malaysia.



Ben Arabo og Tommy Petersen hittast í Cairo

**Hóast føroyska oljuvinnan enn ikki meira enn hevur traðkað sínar barnaskógvar, so hava føroysk oljufólk slitið nógvar skógvar í arbeiðsørindum kring alla verðina. Ein teirra er Ben Arabo úr Signabø, sum hesi mongu seinastu árini hevur ferðast millum Føroyar og oljulond úti í heimi fyri oljufelagið Amerada Hess.**

OLJUSTØRV
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var ein bæði bilsin og fegin Tommy Petersen, sum í fjør tók telefonina í íbúð síni í Cairo. Í hinum endanum var eingin mætari enn Ben Arabo. Hann var ikki langt av landi skotin, sum Tommy helt, hann var í býnum og vildi sleppa at heilsa uppá ein annan føroying, sum hevur valt sær arbeiði uttan fyri heimlandið.

Ben Arabo, sum hevur verið stjóri í føroysku deildini hjá amerikanska oljufelagnum Amerada Hess í Føroyum í mong ár, hevur nú í eina tíð eisini tikið sær av týðandi uppgávum hjá felagnum í øðrum londum, eitt nú í Afrika og Asia. Tað er tó ikki hvønn dag, at leiðin gongur so langt út í heim. Vanliga verður ferðast millum Havnina og London, har Ben leggur nógv av síni arbeiðsorku. Sum royndur oljumaður og við innliti í fyrireiking til oljuleiting á tí fíggjarliga økinum er brúk fyri monnum sum Ben aðrastaðni eisini, har Amerada Hess hevur fingið tillutað leitiloyvi.

Í fjør gekk so leiðin til Egyptalands og til Algier umframt longur eystur til Kualalumpur í Malaysia. Og tá tað altíð hevur verið gamalt, at tú hittir onkran føroyingar, hvar enn í verðini tú ferðast, so setti Ben seg í samband við Tommy, sum arbeiðir hjá danska felagsskapinum Danida. Tað hepnaðist so teimum báðum og familjuni hjá Tommy at